


**LEYGARKVØLDIÐ**
**23. januar kl. 20.00**





## Rósa í ódnarveðri

Hon er fleiri ferðir endað í politiskum ódnarveðri orsaka av ætlaðum sparingum á almannaøkinum. Túsundtals fólk mótmæla hennara ætlanum, politikarar og floksfelagar renna undan henni, og fjølmiðlar renna eftir henni. Hvussu upplivir landsstýriskvinnan lívið í meldrinum, og hvussu kennist tað at fáa harðar politiskar og persónligar ákoyringar?



## Tá journlisturin verður søgan

Jón Brian Hvidtfeldt er hóttur av uppsøgn sum tíðindaleiðari í Kringvarpinum, og hann er endaður á forsíðunum á føroysku bløðunum. Hvussu kennist tað, tá ið journalisturin alt í einum verður søgan. Jón Brian fer at svara spurningum um journalistar, sum skjóta og verða skotnir, og vit spyrja eisini, um ein góður journalistur í sær sjálvum er ein góður leiðari.

## Vágadaman sum vil verða poppstjørna

Songkvinnan Christal, sum er ættað úr Miðvági, roynir at vinna fram í Danmark. Hon hevur givið stakfløgu og sjónbandalag út, og í næstum kemur nýggj fløga. Christal flýgur til Føroya og framførir live. Eisini verður tosað við hana um lívið sum poppsangari.

RÁS
...títt radio